

*- Mannfólkini, sum støkka inn á gólvið í Underwear, leita sum oftast eftir onkrum, teir sjálvir kundu hugsað sær at sæð dámuna í, greiðir Hans Pauli Jacobsen frá*

# Vinmenninir øvunda honum

Tað er ikki frítt, at vinmenninir er øvundsjúkir, tá 29 ára gamli Hans Pauli Jacobsen fer til arbeiðis, har hann er umgyrdur av snøggum kvinnum í lekrum undirklæðum

Heilir veggir á tremur við blondutrussum og brósthaldaraum í alskyns litum. Plakatir við eiggiligum sprundum í brúðarundirklæðum, ið eru sum tikin úr einum dreymi.

Men, nei, vit eru ikki stødd í einum mannfólkadreymi, men í handlinum Underwear, sum 29 ára gamli Hans Pauli Jacobsen hevur rikið seinastu tvey árini í Klaksvík.

**Heppin handilsmaður**

Hóast Hans Pauli Jacobsen ikki sjálvur heldur sítt starv vera øðrvísi, enn so mong onnur, høvdu hansara vinmenn onki havt ímóti at verið í hansara stað. Serliga tá klæðini frá Underwear eru við á mótaframsýningum.

– Eg skal jú bæði síggja og góðkenna modellirnar í undirklæðunum, áðrenn tær fara á pallin. Til slíkar uppgávur hevur onkur vinmaður latið meg vita, at eg eri ein óvanliga heppin handilsmaður, flennir ungi klaksvíkingurin.

Tað var annars eitt sindur av tilvild, at Hans Pauli Jacobsen fór undir at selja undirklæðir til kvinnur. Fyri tveimum árum síðani lat einasti handilin av slíkum slag í Klaksvík aftur, og hann fekk bjóðað at yvirtaka umboðini. Hevði tað ikki verið, tí hann harvið slapp at umboða bæði Triumph og Femilet, so ivast Hans Pauli Jacobsen í, um hann hevði tikið av.

**Góðskan í topp**

– Tað ber altíð til at finna smart undirklæði til kvinnur, men um góðskan ikki er í lagi, fari eg ikki at bjóða kundunum vøruna. Góðskan á Triumph og Femilet er serliga góð, og snið og litir fylgja væl við mótanum, so eg fekk hug at royna, sigur hann.

At reka ein slíkan handil krevur sjálvandi, at eisini Hans Pauli Jacobsen fylgir væl við í, hvat slag av undirklæðum er uppi júst nú, og hvørji snið og litir fara at gera seg galdandi longur fram í tíðina.

– Tað er við undirklæðum, sum við øðrum móta. Eg skal longu nú bíleggja tað, sum skal vera í handlinum í heyst. Tað er ikki altíð líka lætt, tí føroyingar eru ofta nakað seinir at taka við tí nýggjasta nýggja. Og tað ger tað ikki lættari, at eitt merki sum Femilet ofta er serliga frammarlaga, greiðir ungi handilsmaðurin frá.

Umframt at fara á handilsstevnur og tosa við útlendsku umboðini fær Hans Pauli Jacobsen eisini tips um nýggjastu rákini frá kvinnuligu kundunum sjálvum.

– Underwear hevur eina profil á MySpace, har konufólk ofta spyrja eftir ávísum vørum, sum kanska ikki eru komnar til Føroyar. Og tær, sum koma inn á gólvið, koma eisini við góðum tipsum um, hvat fer at verða serliga væl umtókt, sigur Hans Pauli Jacobsen.

**Mannfólkini aftra seg ikki**

Annars er tað ikki so sannlíkt, at tað er Hans Paula sjálvan, kvinnurnar hitta, tá tær koma inn í Underwear at leita sær eftir lekrum undirklæðum. Hann valdi nevniliga frá byrjan at lata eina dámu standa í handlinum, og tað hevur sína serligu orsøk.

– Tá tú selur dygdargóð undirklæði, skal tænastan eisini vera í topp. Men tað er ikki vist, at allar kvinnur halda tað vera so stuttligt, at eitt mannfólk skal hjálpa teimum við at fáa brósthaldaran at sita rætt, so tað lati eg konufólkini um, sigur Hans Pauli Jacobsen, sum tó fegin gevur góð ráð, tá mannfólk støkka inn á gólvið.

Og tað eru teir nógvir, sum gera – uttan himpr og ikki bara á jólum ella á Valentines Day.

– Summir hava fingið ordrar til, hvat teir skulu keypa, so tá er ikki so nógv at gera. Men teir flestu leita eftir onkrum, teir sjálvir kundu hugsað sær at sæð dámuna í. Tá vegleiði eg fegin, tí eg havi eisini mínar tankar um, hvat eg haldi vera pent, sigur Hans Pauli Jacobsen og avdúkar, at honum dámar sera væl blá- og grønligu pastellitirnir, sum eru frammi beint nú.

– Reyðu undirklæðini eri eisini altíð pen, meðan tey hvítu í einføldum sniði hava ein serligan stíl yvir sær. Til dømis hetta brúðarsettið, sigur Hans Pauli Jacobsen og tekur eitt óvanliga vakurt hvítt sett úr silki niður av vegginum.

*– Brúðarundirklæði*
*– finnast slík?*

– Sjálvandi. Ein brúðarkjóli krevur jú ofta, at brósthaldarin ikki hevur stroppar og kanska eisini korsagu-skap, sigur ungi handilsmaðurin við professionellari rødd.

**Hvørt til sína tíð ella ...?**

Men alt er ikki bara blondir og silki í Underwear, tí í handlinum finnur tú eisini til dømis ammu- og ítróttarbrósthaldarar.

– Hvørt til sína tíð, heldur Hans Pauli Jacobsen fyri, men leggur afturat, at eisini tann hugburðurin er við at broytast.

– Føroyskar kvinnur aftra seg ikki við at keypa undirklæði, sum vórðu hildin at vera tað reina luksus fyri bara fáum árum síðani. Kvinnurnar vilja kenna seg væl frá innast til uttast, og tá hava lekkur undirklæði alt at siga, havi eg latið mær fortalt, sigur ungi handilsmaðurin úr Klaksvík.

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Mynd: Sunva Eysturoy Lassen*